# Jólakalendarin '07




# Ársins jólakapping í Sosialinum

**Vinn eina dreymaferð fyri familjuna til Disney World í Florida. Aðrir góðir vinningar standa eisini upp á spæl í stóru jólakappingini hjá Sosialinum**

Nógvir góðir og spennandi vinningar eru at vinna í jólakappingini, sum Sosialurin nú fer undir. Í desember mánaði kunnu øll fylgja við í Sosialinum og verða við í kappingini, har høvuðsvinningurin er ein familjuferð til Disney World í Florida í USA.

Kappingin byrjar í dag við jólakalendaranum, sum er sendur í hvørt hús í landinum. Á kalendaranum eru pláss gjørd fyri 24 puntum, og hesir puntar verða at finna í Sosialinum fram til jóla. Puntarnir skulu klippast út úr Sosialinum og límast upp á kalendaran, sum síðani verður sendur til Sosialin. Hetta skal gerast í seinasta lagi tann 3. januar 2008.

Kalendarin skal sendast til: Sosialurin, Postsmoga 76, 110 Tórshavn.

Fríggjadagin 4. januar verður lutakst millum kalendararnar, sum eru komnir inn, og tá verða vinnararnir av teimum spennandi vinningunum funnir. Nøvnini verða prentað í Sosialinum tann dagin.

### Trølla Pætur spyr

Trølla Pætur og Trølla Omman eru framvegis í miðdeplinum í jólakalendaranum, sum Óli Petersen hevur teknað. Í ár verður ikki nøkur framhaldssøga um tey villu trøllini, men hinvegin fer Trølla Pætur at spyrja ommu sína ymsar spurningar, sum børnini kunnu hjálpa henni at svara.

So desember mánaði verður bæði hugnaligur og spennandi í Sosialinum.




**Minst til 1. desember...**

Minst til at skifta battaríini
á roykvarnaranum
áðrenn 1. desember

TRYGGINGARFELAGIÐ
FØROYAR
- so ert tú tryggari